# Tá Principia fór á land



*Hanus Kamban*

**Í tíðarritinum TJALDRI nr. 41 eru m.a ritgerð um Principiu og áhugaverd Føroya-grein eftir Max Nordau**

Nr. 41 av TJALDRI, tíðarritinum hjá tí týsk-føroyska vinafelagnum, kom haldarunum í Føroyum í hendur fyri o.u. einum mánaði síðani. Í blaðnum, sum hesa ferð er heilar 148 síður, er ein hópur av ymiskum og áhugaverdum tilfari um føroysk viðurskiftir. Her eru eitt nú ummælir og umrøður av átta verkum, harímillum tí nýggju ensk-føroysku orðabókini hjá Sprotanum, bókini *Toftanes* eftir Steffen Stummann Hansen og *Eikirótum* eftir Zakarias Wang.

TJALDUR vendir sær fyrst og fremst til týskar lesarar, og ein partur av blaðsins tilfari er tikið úr føroyskum bløðum og umsett til týskt. Men í hvørjum blað eru eisini áhugaverdar og upplýsandi greinar, sum eisini føroyskir lesarar kunnu fáa gleði og nyttu av.

Hesa ferð almannakunnger tann sera virkni TJALDUR-veteranurin Detlef Wildraut eina grein um eimskipið *Principiu*, sum fór í spønir og sakk við Søltuvík í Sandoy í november 1895. Í greinini, sum byggir á ein hóp av ymiskum tilfari, fylgir Wildraut skipi og manning frá tí tey fóru úr Dundee í Skotlandi tann 16. nov. 1895 og til skipið tann 21. rendi á eitt sker í Søltuvík. Wildraut greiðir frá, hví eimskipið, sum var á veg til New York, endaði í Føroyum, og hvussu tað bar til, at 27 av tilsamans 28 av manningini, og tað eina ferðafólkið, sjólótust. Hann greiðir frá, at ein einstakur maður, týskarin Heinrich Anders, kom sær á eina lastlúku, rak við streyminum í 13 tímar og at enda – sum við einum undurverki – bleiv bjargaður av monnum úr Kirkjubø.

Síðani verður við fáum orðum sagt eitt sindur frá lívinum hjá Heinrich Anders. Hugtakandi er at lesa um, hvussu hann í 1936 kemur aftur til Føroya, fer til Kirkjubøar, sær, at lúkan, hann á sinni lá og krøkti seg í, er endað sum borðpláta í roykstovuni og – brestur í grát. Heinrich Anders, sum var úr bygdini Wahrsdorf sunnan fyri Rostock, búði seinni í Rostock og er í 1940 enn á lívi. Men eftir tað hvørvur hann úr skjølunum.

Heldur enn ikki forvitnislig er eisini frásøgn eftir Max Nordau um eina stutta vitjan í Føroyum í 1874. Tann ungarski jødin Max Nordau(1849-1923) var í sínari tíð ein sera kendur persónur, lækni, blaðmaður, rithøvundur (serliga kendur fyri verkið *Entartung*, 1892) og ein teirra, sum kveikti lív í ta zionistisku rørsluna. Nordau sær Føroyar gjøgnum hámentaðar meginlandsbrillur. Hann rósar Realskúlanum, men tað mesta hann sær tykist honum lítilsvert, mishátt, primitivt og grefligt. Í sínum eftirmæli viðger Norbert Vogt á atfinngarsaman hátt Nordaus frágreiðing og hansara tørvandi empati.

TJALDUR, sum er skrivað á týskum, fæst í føroyskum bókhandlum og liggur frammi úti á Landsbókasavninum.



# Tíðindaleiðari fingið morgungron

**BJØRN KALSØ**

løgtingslimur



**Í grein nevnd "Góðan morgun fólkaræðið Føroyar", gevur tíðindaleiðarin í Kringvarpi Føroya, Jón Brian Hvidfeldt, illa útborin ilt av sær og skuldsetir politikarar fyri at ræðast fólkaræðið. Orsøkin til vreiðina er, at spurnartekin er sett við, um samsvar er millum kringvarpslógina og leiðslubygnaðin í Kringvarpi Føroya**

Nakað eftir at Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya vóru løgd saman fyri fýra árum síðan, varð kringvarpslógin samtykt við breiðum meiriluta á Løgtingi.

Um bygnað tilskilar kringvarpslógin at: "*Stjórin ger uppskot til stovnsbygnað, sum stýrið staðfestir, tó so at tað til eina og hvørja tíð skulu vera tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir*", ein útvarps- og ein sjónvarpseind.

Við nýggja leiðslubygnaðinum í Kringvarpi Føroya varð ein tíðindaleiðari settur at leiða bæði útvarps- og sjónvarpstíðindini. Spurningurin um sjálvstøðugu eindirnar spøkti í hesum sambandi. Tí varð landsstýriskvinnan, Helena Dam á Neystabø spurd, um hon metti bygnaðin vera í lagi. Landsstýriskvinnan hevur síðan boðað frá, at tað metir hon ikki, sjálvt um landsstýriskvinnan undan henni, Kristina Háfoss, hevði góðtikið bygnaðin.

Sitandi landsstýriskvinnan hevur sostatt ein trupulleika, sum hon ikki sjálv eigur part í, men sum kortini skal loysast, annaðhvørt við at broyta lógina ella við bygnaðarbroytingum.

Hví tíðindaleiðarin í Kringvarpinum hevur fingið morgungron av einum so einfaldum máli, er ilt at meta um, men ein orsøk kann ivaleyst vera væntandi virðing fyri fólkaræðinum hjá tíðindaleiðaranum sjálvum, sum onnur í greinini "*Góðan morgun fólkaræðið Føroyar*" annars verða skuldsett fyri at ræðast.

**Valdsbýti**

Somuleiðis skuldsetir sinti tíðindaleiðarin limir í mentunarnevnd Løgtingsins fyri frammanundan at hava góðtikið leiðslubygnaðin í Kringvarpinum. Orsøkin til uppáhaldið er, at mentunarnevndin á fundi í Kringvarpinum í mai í fjør varð kunnað um, at leiðslan í Kringvarpinum arbeiddi við møguligum bygnaðarbroytingum.

Tíndaleiðarin átti at vitað, at Løgtingið er løggevandi, ikki útinnandi. Tað er tí ikki luturin hjá løgtingssnevndini at gera ella góðkenna bygnaðin í Kringvarpi Føroya. Ta uppgávuna eiga landsstýrið, aðalráð, stovnsleiðslur og stýrið. Hetta var eisini greiða niðurstøðan eftir kunnandi fundin í Kringvarpi Føroya í fjør.

# Fullveldi ella Samveldi ?

**TRYGVI F. GUTTESEN**



Tá ið vit skulu velja millum **Fullveldi** ella **Samveldi** er tann altavgerandi spurningurin: Hvussu verður við okkara persónliga frælsi og okkara sjálvræði?

**Persónligt og grundleggjandi frælsi**

Menniskjað hevur íløgd evni at kunna velja. Frælsi er so at hava høvi til at nýta hesi evni. At seta tað í verk, vit hava hug til og ætla uttan atlit ella tvingsil.

Ymsar forðingar standa í vegin fyri at velja frítt. Bæði náttúrugivnar og menniskjaskaptar.

Aðrar avmerkingar í frælsinum áleggja vit okkum sjálvum. T.d. gjøgnum mentanarlig ella átrúnaðarlig virði, ið vit meira ella minni av fríum vilja góðtaka.

Menniskjað er ein sosial vera og livir í samfelag við onnur. Samfelagið ger lógir, ið leggja avmarkingar á hin einstaka, men fríger eisini. Persónliga frælsið verður skert til frama fyri heildina og harvið eisini hin einstaka.

Øll góðtaka at avmarka frælsið á einum øki, fyri at fremja størri frælsi á einum øðrum. Ferðslulógirnar virka á henda hátt: Hin einstaki verður avmarkaður fyri at heildin skal kunna flyta seg í ferðsluni á besta hátt.

**Frælsi til nakað og frælsi frá nøkrum**

Frælsi frá nøkrum kann vera frælsi frá tvingsli, ið ikki er grundaður í felags atliti til hini. Frælsi frá kúgan, frælsi frá diskrimination vegna húðalit, religión og aðra sannføring.

Frælsi til nakað kann vera ymisk rættindi. Rættin til at liva í friði, ið er meira enn bert frávera av kríggi. Rættin til ókeypis undirvísing, heilsuverk o.s.fr.

**Demokratiskt frælsi**

Frælsi til nakað og frælsi frá nøkrum er eisini innihaldið í tí demokratisku stýrisskipanini, sum øll lond á okkara leiðum verða skipað eftir. Grundprinsippið er fyri tað fyrsta, at javnrættur er galdandi fyri allar borgarar. Øll hava frælsi til tað sama.

Undir fólkastýrinum fyrst og fremst til at ávirka samfelagið í sama mun við tí almenna valrættinum, hartil við talifrælsinum, at skipa seg í felag og t.d. frælsinum ella rættinum til at virka frítt vinnuliga og trúarfrælsinum. Demokratiska frælsið gevur okkum hesar rættir, ið eru so grundleggjandi partur av okkara frælsisuppfatan.

**Frælsi í vælferðarsamfelagnum**

Ì ríku samfeløgunum her fyri vestan eru vit eisini farin at rokna ymiskar góðar, sum hoyrandi til grundleggjandi frælsi.

Somuleiðis eru ymiskir rættir so við og við komnir upp í fatanina av frælsi. Øll hava skyldu til eina felags útbúgving svarandi til fólkaskúlan. Hetta verður mett sum neyðugt fyri at kunna gera sær gagn av tí frælsi, vit hava í okkara samfelag. At duga at lesa og skriva eru grundleggjandi kunnskapir fyri at kunna liva fræls í einum frælsum samfelag. Henda skúlaskylda kann og eigur eisini at metast sum ein rættur hjá øllum.

Ì okkara samfeløgum hava vit aðrar rættir, ið vit meta neyðugar, men sum kanska ikki hoyra til grundleggjandi frælsishugtakið. Rætturin til víðari útbúgving er ein samfelagsgóði, ið vit heilt víst tengja saman við okkara fatan av frælsi. Men nógv tann størsti parturin av heiminum hevur ikki henda møguleika, hóast vit kunnu tala um grundleggjandi frælsi. Sostatt fær frælsishugtakið eina politiska dimensión.

Eitt týðuligari dømi er rætturin til útbúgvingar í øðrum londum. Ella rætturin til ókeypis sjúkrahúsviðgerð. Sum borgarar í verandi ríki hava føroyingar fullan rætt til allar útbúgvingar í okkara stóra Samveldi. Danski staturin og føroyska landsstýrið leggja dent á hetta sum ein rætt hjá øllum og syrgja fyri ókeypis (ella so at siga ókeypis) útbúgvingum og lata hartil stuðul, so allir borgarar eisini í praksis standa á jøvnum føti. Somuleiðis standa almennu sjúkrahúsini øllum borgarum í boði ókeypis.

Um slíkir góðar skulu roknast upp í frælsishugtakið er ein politiskur spurningur. Her er also talan um, hvussu nógv av sama slag, vit hava at velja í. Frælsisrætturin í tí grundleggjandi merkingini, er javnrætturin til vælferðargóðarnar.

Sambandsflokkurin hevur ta áskoðan, at næstan øll aspekt av hesum sera týðandi hugtaki annars eru irrelevant í politiska kjakinum um stjórnarstøðuna í dag. Frælsi kann ikki fatast uttan í mun til ófrælsi. Tann ið ikki kennir ófrælsi, kennir heldur ikki frælsi, og í dag hava vit í Føroyum ( við onkrum minni týðandi undantøkum ) einki ófrælsi, ið stendst av stjórnarstøðuni.

**Vit halda týskil, at mesta frælsi fyri Føroya fólk fast í einum Samveldi millum Føroyar, Danmark og Grønland, og vit vilja verja føroyska sjálvræði innan hetta Samveldi. Føroyar verða ikki eitt frælsari land at búgva í, um vit ístaðin velja loysing, velja Fullveldi.**

Vit kunnu hinvegin ásanna, at loysing fer at hava við sær, at tann einstaki fær minni í at velja, fær færri møguleikar, færri rættindir, og at rættarskipanin,vegna ógegni, fer at skerja rættartrygdina, og tískil verður frælsi hjá tí einstaka minni, um vit taka loysing – um vit velja Fullveldi.

**Fullveldi fer ongantíð at geva øllum føroyingum evsta vald á so nógvum økjum, sum eitt Samveldi gevur.**